Viðtøkur hjá Hvalbiar Sóknar Kappróðrarfelag

Lógir felagsins

Grein 1
Navn felagsins er Hvalbiar Sóknar Kappróðrarfelag. Endamál felagsins er at geva limunum høvi at rógva og luttaka í kappingum.

Grein 2
Fyri at gerðast felagslimur má viðkomandihava fylt 6 ár. Limir hava ikki atkvøðurætt fyrr enn teir eru fyltir 14 ár. Limagjaldið verður ásett av aðalfundinum á hvørjum ári. Limagjaldið verður goldið í januar/februar.

Grein 3
Limur, ið stendur í eftirstøðu við limagjaldi sínum fyri tvey ár, verður strikaður av felagnum, um hann ikki aftaná áheitan letur við seg koma.

Grein 4
Bert limir hava atgongd til venjingar í ítróttargreinum felagsins. Stjórnin kann tó geva serloyvi í vissum førum.

Grein 5
Fyri at gerðast limur í felagnumm skal ein venda sær til kassameistaran. Áðrenn limur fer úr felagnum, skal han til kassameistaran hava goldið tað, hann skildar felagnum.

Grein 6
Ársaðalfundurin hevur hægasta mynduleika í viðurskiftum felagsins. Ársaðalfundinurin verður hildin millum 1. januar og 1. apríl. Eykaaðalfundur og limafundur kunnu haldast so ofta, stjórnin heldur tað verða neyðugt, ella um 10 limir skrivliga krevja tað. Ársaðalfundurin er viðtøkuførur, tá í minsta lagi 1/10 av limunum møta, annars verður hann kunngjørdur av nýggjum við 8 daga ávaring, og er hann tá viðtøkuførur uttan mund til, hvussu mangir limir møta.
Rætt til at møta og atkvøða á aðalfundinum hevur tann, ið goldið hevur limagjald fyri farna árið og stendur ikki í eftirstøðu.
Avgerðir á ársaðalfundinum verða gjørdar við atkvøðumeiriluta. Atkvøðan við val av stjórn fer fram í loyndum. Avgerðir í øðrum málum fara fram við at rætta hondina upp, um ikki limir ynskir tað á annan hátt.

Grein 7
Stjórnin kunngerð ársaðalfudin við gøtuuppsløgum í minsta lagi 14 dagar frammanundan.

Grein 8
Ársaðalfundurin hevur hesa føstu fundarskrá:
1. Formaður greiðir frá virki felagsins í farna árinum.
2. Grannskoðaður roknskapur verður framlagdur til góðkenningar.
3. Val av nevndarlimum, eykamonnum og grannskoðara.
4. Innkomin mál.
5. Ymiskt

Grein 9
Aðalfundur felagsins velur eina nevnd, ið telur 7 limir. Hesir limir standa fyri vali soleiðis, at fýra standa fyri vali annahvørt ár, og tríggir annahvørt ár. Tveir eykalimir verða eisini valdir, og standa hesir fyri vali á hvørjum ári. Nevndin hevur allan ítrótt um hendi, setur venjara og hevur alla ábyrgd av rakstrinum av felagnum.

Grein 10
Avgerðir tiknar á aðal- eykaaðal- lima ella stjórnarfundi verða ritaðar í gerðabók felagsins, ið framløgd verður á aðalfundinum. Formaðurin ella skrivarin kann eisini rita í gerðabókina serhendingar, ið týdning hava fyri søgu felagsins.

Grein 11
Roknskapaárið er frá 1. jan. til 31. des.
Kassameistarin flýggjar roknskapin fyri farna árið til grannskoðaran um miðjan dec., og hann handar hann aftur til grannskoðan til formannin síðst í januar. Stjórnin hevur til eina og hvørja tíð rætt til at síggja roknskap og skjøl felagsins.

Grein 12
Stjórnin tekur út øll kappingarlið í samráð við venjara ella úttøkunevnd, ið stjórnin er heimilað til at velja.
Á útferðum setir stjórnin ein ferðaleiðara, og hevur hann ábyrgd av, at alt fer regluliga fram.
Tað er skylda limanna at vera lýdnir lógum felagsins, so at vinsemi, gott samanhald og fram um alt ítróttarhugur verður felagsins eyðkenni.

Grein 13
Um limur skaðar felagið í atburði sínum, kann hann útihýsast við aðal - ella eykaaðalfundar avgerð.

Grein 14
Avgerð um avtøku felagsins kann bert fremjast á einum aðalfundi, ið kunngjørdur er till hetta sama endamál við 14 daga ávaring.
Slíkur funder er bert viðtøkuførur, tá ið 3/4 av felagslimunum møta. Avtøkan kann bert fremjast, um 5/6 av atkvøðunum eru fyri tí.

Grein 15
Um felagið verður avtikið, skal tað, ið felagið eigur, aftan á hava staðið 30 ár inni á eini serkonto, falla til Arbeiðsmannafelagið.
Um tað hendir at felagið verður uppafturtikið innanfyri tey áðurnevndu 30 ár, skal tað, sum stendur á hesi bankakonto fella aftur til felagið. (Hetta sama er galdandi, um annað felag verður stovnað her á plássinum við sama endamáli.)

Grein 16
Ognir felagsins kunnu ikki veðsetast, t.d. við lántøku, uttan aðalfundarsamtykt.

Grein 17
Uppskot til broytan ella tilskilan viðvíkjandi felagslógini kann bert viðgerast og avgerast á einum aðalfundi, aftaná at hava verið til umrøðu á einum eykaaðalfundi.